

# Føroya Kærustovnur

## Ársfrágreiðing

## 2014



Ársfrágreiðingin 2014 hjá Føroya Kærustovni
Umbróting og teknindi: C4
Liðugtgerð: www.c4designit.com

# Innihaldsyvirlit

Føroya Kærustovnur | Ársfrágreiðing | 2014

1. Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
2. Kærustovnurin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
3. Virksemið í 2014 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
4. Kærunevndin í Almanna- og heilsumálum . . . . . . 13
5. Skatta- og avgjaldskærunevndin . . . . . . . . . . . . . . 35
6. Kærunevndin hjá Studna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 43
7. Kærunevndin í Lendismálum . . . . . . . . . . . . . . . . 47
8. Vinnukærunevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 53
9. Psykiatriska sjúklingakærunevndin . . . . . . . . . . . . 65
10. Skuldarumskipanarnevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . 69
11. Fjølmiðlanevndin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 75
12. Heimasíða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 79

# 1. Inngangur

> „Kærustovnurin er nú skrivstova hjá **9** ymiskum nevndum"

Tann 1. januar 2015 fekk Kærustovnurin um hendi skrivstovuvirksemið hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð í málum um umsorganaryvirtøku, samverurætt, familjuviðgerð, dag- og samdøgurstilboð á stovnum hjá landinum og málum, har samtykki ikki er fingið frá foreldramyndugleikanum ella barni yvir 15 ár. Avgerðirnar hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini eru grundaðar á tilmæli frá barnaverndarnevndunum kring landið.

Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur somuleiðis avgerð um rætt til ókeypis umboðan í nevndu málum.

Høvuðsbarnaverndarnevndin er ikki ein kærunevnd, og upplýsingartilgongdin er tí øðrvísi enn í hinum nevndunum, sum vit eru skrivstova hjá. Ásettar tíðarfreistir hava eisini við sær, at málini mangan skulu handfarast við slíkum skjótleika, sum er undantakið í vanligari kæruviðgerð. Hóast hesi viðurskiftið, verður uppgávan mett at hóska til í okkara skipan, tí vit hava drúgva venjing í at eftirkanna, at avgerðir eru løgfrøðiliga rættar.

Henda frágreiðing fevnir um virksemið á Kærustovninum í 2014 og fevnir tí ikki um virksemið hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, sum ikki er byrjað fyrr enn í 2015.

Við hesi víðkan av starvsøkinum, er Kærustovnurin nú skrivstova hjá 9 ymiskum nevndum.

Tórshavn, apríl 2015

Anja Hovgaard
stjóri

# 2. Kærustovnurin

Kjarnuuppgávan hjá Føroya Kærustovni er at vera skrivstova hjá kærunevndum, ið viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum.

Fyri tað fyrsta er tað fyrireikingin av málunum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Studna, Kærunevndina í lendismálum, Vinnukærunevndina og Psykiatrisku sjúklingakærunevndina, sum stovnurin tekur sær av.

Kærustovnurin tekur sær av skrivstovuvirkseminum hjá nevndunum. Stovnurin móttekur kærurnar, skrásetir tær, sendir tær til ummælis og hoyringar hjá avvarðandi myndugleikum og møguligum triðju pørtum. Tá málið er fult upplýst, verður løgfrøðiligt upprit við tilmæli til niðurstøðu gjørt, og verður hetta saman við skjalatilfarinum í málinum sent nevndarlimunum. Innkallað verður til fundar, og tá kærunevndin hevur tikið avgerð, avgreiðir Kærustovnurin avgerðina til kærara og avvarðandi myndugleika.

Avgerðirnar hjá kærunevndunum verða síðani gjørdar navnleysar og lagdar út á avgerðarsavn á heimasíðu okkara. Eisini tekur stovnurin sær av samsýningini hjá nevndunum og av goymsluni av málunum hjá nevndunum.

Kærustovnurin er eisini skrivstova hjá Fjølmiðlanevndini, sum viðger spurningar, um brot er framt á góðan fjølmiðlasið og um ættin at svara aftur. Hóast talan ikki er um avgerðir hjá almennum myndugleikum, er upplýsingarmannagongdin og fyrireikingin stórt sæð tann sama sum fyri hini málini.

Eisini upplýsir og fyrireikar Kærustovnurin mál um skuldarumskipan til Skuldarumskipanarnevndina at taka støðu til. Henda nevnd er ikki ein kærunevnd, men tekur støðu til umsóknir frá borgarum um eftirgeving, útsetan og umskipan av skuld.

## Starvsfólk

Starvsfólkatalið á stovninum er umleið átta fulltíðarstørv. Starvssamansetingin fevnir um 1 stjóra, 3 1/3 løgfrøðingar, deildarleiðara og 2½ skrivstovufólk.

## Fíggjarviðurskifti

Fíggjarjáttanin hjá Kærustovninum 2014

| | |
|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan, kr. . . . . . . . . . | 5.245.000 |
| Lønir v.m., kr. . . . . . . . . . . . . . . . . . . | 4.413.000 |
| Keyp av vørum og tænastum, kr. . . . . | 400.000 |
| Keyp av útbúnaði, netto, kr. . . . . . . . . | 60.000 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur, kr. . . . . | 372.000 |

Nevndirnar verða samsýntar av játtanini hjá Kærustovninum.

# 3. Virksemið í 2014

## Innkomin mál

Í 2014 móttók Kærustovnurin 217 nýggj mál. Hetta er lægsta tal av kærum í 10 ár. Kærutalið hevur ikki verið so lágt síðan 2004, tá 192 kærur vóru móttiknar. Talið av kærum skal haldast upp í móti talinum av nevndum, sum vit hava í dag í mun til talið av nevndum tá. Í 2004 vóru bert tríggjar nevndir á Kærustovninum og í 2014 eru 8 ymiskar nevndir á stovninum.

Sum talvan vísir, hevur ein minking verið í innkomna talinum av málum á hvørjum ári síðan 2009. Leggjast skal tó til merkis, at árini 2009 og eisini 2008 vóru serlig á tann hátt, at bæði árini vóru fleiri enn 100 av innkomnu kærunum um mvg á skrásetingargjaldið.

**217**

**Nýggj mál**

Tað er einans Psykiatriska Sjúklingakærunevndin og Kærunevndin í lendismálum, sum hevur fleiri innkomin mál í 2014 enn í 2013. Hartil er tó at siga, at talið av kærum til Kærunevndina í lendismálum var serliga lágt í 2013, so hóast hægri enn árið frammanundan, er talið eisini lágt í 2014.

Hvønn veg talið av málum fer ber ikki til at siga, og hevur Kærustovnurin ikki ávirkan á, hvussu nógv mál koma inn, men er hetta tengt at, hvussu nógvar og hvørjar avgerðir verða tiknar av teimum myndugleikum, hvørs avgerðir kunnu kærast til tær ymsu nevndirnar.



## Avgreidd mál

Avgreidd eru 274 mál í 2014. Hetta eru nøkur fleiri enn í 2013. Fyri flestu nevndirnar er tað galdandi, at avgreidda tali av kærum er á leið tað sama sum árið frammanundan. Tó avgreiddi Skuldarumskipanarnevndin fleiri mál hetta árið enn árið frammanundan, meðan Vinnukærunevndin avgreiddi munandi færri mál.

**274 avgreidd mál**

Talið av avgreiddum málum er tengt at talinum av innkomnum málum, og tá talið av innkomnum málum lækkar, má talið av avgreiddum málum fyrr ella seinni fara sama veg.




## Mál um innlit

Umframt vanligu kærumálini hava nevndirnar viðgjørt umbønir um innlit. Talan kann vera um umbønir um alment innlit frá t.d. fjølmiðlum ella partsinnlit frá pørtum í einum máli.

**3 mál um innlit**

Tilsamans vóru 3 umbønir um innlit viðgjørdar í 2014. Kærunevndin í lendismálum fekk 2 áheitanir um innlit. Fjølmiðlanevndin fekk 1 áheitan.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin er ymisk frá nevnd til nevnd og liggur í 2014 frá 11 døgum fyri Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina til 8½ mánað fyri Skuldarumskipanarnevndina.

Miðal viðgerðartíðin fyri Kærunevndina í lendismálum er knappar 3½ mánað í 2014 og er soleiðis munandi styttri enn miðal viðgerðartíðin hjá nevndini í 2013, sum var 7½ mánað. Miðal viðgerðartíðin fyri Vinnukærunevndina er stytt í mun til árið frammanundan og er í 2014 knappar 3 mánaðir. Miðal viðgerðartíðin fyri Fjølmiðlanevndina í 2014 var góðar 3 mánaðir. Hetta er styttri enn miðal viðgerðartíðin í 2013, sum var omanfyri 5 mánaðir.

Hinvegin er miðal viðgerðartíðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini og Skuldarumskipanarnevndini longd við 1 mánað í mun til 2013, meðan miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum og Psykiatrisku sjúklingakærunevndini stórt sæð er tann sama sum undanfarna ár.

Samanumtikið verður mett, at miðal viðgerðartíðirnar á flestu økjum mugu sigast at vera nøktandi hetta árið. Kærustovnurin strembar tó altíð eftir at hava so stutta viðgerðartíð sum gjørligt. Men tað er greitt, at ein miðal viðgerðartíð fyri eitt øki kann vera longri enn fyri annað øki og tó vera nøktandi, tí tað er ymiskt, hvussu langa tíð tað tekur at upplýsa, viðgera og fyrireika málini innan ymsu økini.



# 4. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum

## Nevndin

Í Kærunevndini í almanna- og heilsumálum sita:

- Sigmund Poulsen - løgfrøðingur og formaður
- Annika Olsen - lækni
- Selma Ellingsgaard - sosialráðgevi

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá Almannaverkinum
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi
- Avgerðir hjá kommunum um barna- og ungdómstannrøkt
- Avgerðir eftir barnaverndarlógini, sum ikki kunnu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina
- Avgerðir eftir lóg um Heilsutrygd og tilskotsnevndini eftir lóg um almenna heilsutrygd
- Avgerðir hjá kommunum eftir lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

## Móttikin mál

Í 2014 komu 109 nýggjar kærur til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Hetta eru munandi færri enn í 2013, tá 159 kærur vóru móttiknar, og er samstundis lægsta talið av kærum síðan 2003, tá 102 kærur vóru móttiknar. Tað er trupult at siga nakað um orsøkina til, at kærutalið er so lágt hetta árið, men sigast skal, at kærutalið hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum hevur sveiggjað nakað frá ár til ár. Tá kærutalið var uppá tað hægsta var tað 204 og hevur annars ligið

**109**

**Nýggj mál**

um 170 í miðal hesi seinastu 5 árini.

Hóast kærutalið er lægri, er býtið av innkomnum kærum líkt býtinum undanfarnu tvey árini. Flestu kærurnar eru um avgerðir eftir forsorgarlógini. Næstflestar í tali eru kærur um tillutan

og hækkan av fyritíðarpensjón. Hesum á baki kemur bólkurin, sum vit kalla fyritíðar- og fólkapensjónsmál, sum umframt at fevna um persónligt ískoyti, afturgjaldskrøv og aðrar avgerðir eftir almannapensjónslógini, eisini fevnir um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.




Kærurnar eftir sjúkrahúslógini vóru 12 í tali í 2014 og soleiðis á sama støði sum bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 11 og 12 kærur vórðu móttiknar.

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Barnagjaldslógin | 2 | 6 | **4** |
| Barnaverndarlógin | 2 | 9 | **1** |
| Dagpeningalógin | 11 | 14 | **8** |
| Dagstovnalógin | 2 | 1 | **1** |
| Forsorgarlógin | 52 | 46 | **26** |
| Fyritíðar- og fólkapensjónsmál (ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.) | 14 | 25 | **15** |
| Fyritíðarpensjónsmál (tillutan, hækkan v.m.) | 36 | 28 | **25** |
| Heilsutrygd | 2 | 5 | **3** |
| Innlit | - | - | **1** |
| Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk | - | 13 | **11** |
| Lóg um barna- og ungdómstannrøkt | - | - | **1** |
| Nærverkið | 3 | - | **0** |
| Sjúkrahúsverkið | 12 | 11 | **12** |
| Stuðul til uppihaldspening | 3 | 1 | **1** |
| **Í alt** | **139** | **159** | **109** |

## Avgreidd mál

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevði 10 fundir í 2014 og avgreiddi 145 mál. Talið er á sama støði sum undanfarna ár, tá 143 mál vórðu avgreidd, men lægri enn í 2012, tá 164 mál vórðu avgreidd. Orsøkin til hetta er, at færri mál eru innkomin.

Málini eftir forsorgarlógini hava verið nógv flest í tali seinastu mongu árini og fevnir hesin bólkur eisini ógvuliga breitt. M.a. snúgva hesi málini seg um stuðul til uppihald, stakútreiðslur, hjálparráð og endurgjald fyri inntøkumiss. Hetta árið er bólkurin tó á sama støði sum málini um tillutan og hækkan av fyritíðarpensjónum og bólkurin við fyritíðar- og fólkapensjónsmálum. Broytingin stendst av, at partur av avgerðunum, sum fyrr hoyrdu til forsorgarlógina, eitt nú mál um endurbúgving, eru ikki fevnd av forsorgarlógini longur, men eru nú fevnd av lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum varð sett í gildi 1. januar 2013. Hesi mál síggjast nú sum ein bólkur fyri seg og fevndu í 2014 um 15 mál.

**145**

**Avgreidd mál**

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Barnagjaldslógin | 2 | 3 | **6** |
| Barnaverndarlógin | 2 | 11 | **3** |
| Dagpeningalógin | 15 | 7 | **12** |
| Dagstovnalógin | 3 | 2 | **1** |
| Forsorgarlógin | 66 | 43 | **29** |
| Fyritíðar- og fólkapensjónsmál (ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.) | 28 | 20 | **28** |
| Fyritíðarpensjónsmál (tillutan, hækkan v.m.) | 28 | 30 | **29** |
| Heilsutrygd | 1 | 5 | **6** |
| Innlit | | | **1** |
| Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk | | 6 | **15** |
| Lóg um barnatannrøkt | | | **1** |
| Nærverkið | 5 | | **0** |
| Sjúkrahúsverkið | 9 | 14 | **14** |
| Stuðul til uppihaldspening | 5 | 2 | **0** |
| **Í alt** | **164** | **143** | **145** |

## Avgreiðslan

Av teimum 145 avgreiddu málunum, var býtið millum myndugleikarnar soleiðis, at Almannaverkið átti 120 mál, Sjúkrahúsverkið 14 mál, kommunurnar 5 mál og Heilsutrygd 6 mál.



# Almannaverkið

Tey 120 málini hjá Almannaverkinum vórðu avgreidd soleiðis:




| | 2012 | | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 102 | 74% | 59 | 60% | 73 | 68% |
| Broytt | 8 | 6% | 15 | 15% | 9 | 8% |
| Heimvíst | 9 | 7% | 9 | 9% | 17 | 16% |
| Burturfallin | 18 | 13% | 16 | 16% | 9 | 8% |
| Avvíst | | | 2 | | 2 | |
| Kærufreist | 7 | | 6 | | 8 | |
| Uppafturtøka | | | 4 | | 2 | |
| **Í alt** | **144** | | **111** | | **120** | |

N.B. Í uppgerðini er í mun til % sæð burtur frá avvístum málum, málum um kærufreist og málum um uppafturtøku. Fyri 2014 er % tí roknað út frá 108 málum.

Verður alt økið hjá Almannaverkinum tikið undir einum sæst, at prosentparturin av avgerðum hjá Almannaverkinum, sum vórðu staðfestar í 2014, er 68% og harvið hægri enn árið frammanundan, tá prosentparturin av avgerðum, sum vóru staðfestar, var 60 %.

Prosentparturin av avgerðum hjá Almannaverkinum, sum eru broyttar, er lækkaður í mun til undanfarna árið og er 8% í 2014. Árini frammanundan var prosentparturin av avgerðum, sum vóru broyttar ávikavist 15% í 2013 og 6% í 2012.

Parturin av heimvístum málum er hækkaður í mun til undanfarna árið og er 16% í 2014. Í 2013 var parturin av heimvístum málum 9% og í 2012 7%.

Parturin av málum, sum fullu burtur, áðrenn Kærunevndin hevði tikið støðu til kæruna, er 8% í 2014 og sostatt munandi lægri enn undanfarna árið, tá 16% av málunum fullu burtur. Í 2012 var parturin av burturfalnum málum 13%.

Kærur, sum falla burtur, eru í høvuðsheitunum kærur, sum verða tiknar aftur, tí Almannaverkið í sambandi við kæruviðgerðina hevur endurskoðað málið og er komið til annað úrslit t.v.s. broytt ta upprunaligu avgerðina, sum varð kærd. Tað er jaligt, at Almannaverkið leggur seg eftir sjálvt at endurskoða sínar avgerðir, tá tær eru kærdar, m.a. tí Almannaverkið á hendan hátt eisini skjótari tillagar avgerðir sínar í mun til nýggjar avgerðir frá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum. Men best er sjálvandi, um tað er parturin av staðfestum avgerðum, sum er høgt, tí hetta merkir, at borgarin hevur fingið eina rætta avgerð beinanvegin.

Verða burturfalnu málini eisini roknaði við í jaliga partin hjá Almannaverkinum, so verður hesin parturin 76% í 2014, sum er júst tað sama sum í 2013, men nakað væl lægri enn í 2012, tá hetta talið var 87%.

Avgerðirnar, sum verða broyttar ella heimvístar, mynda tey mál, sum ikki eru nøktandi viðgjørd. Hetta er fyri alt økið tilsamans 24% av málunum í 2014. Til samanberingar kann sigast, at í 2013 og 2012 vóru ávikavist 24% og 13% av kærumálunum hjá Almannaverkinum broytt ella heimvíst.

## Prosentbýtið

Í uppgerðini viðvíkjandi Kærunevndini í almanna- og heilsumálum hava vit ikki bert víst á, hvussu nógvar avgerðir eru ávikavist staðfestar, broyttar v.m., men hava eisini víst á, hvussu nógv hetta svarar til í prosentum av avgreiddum málum. Vit hava gjørt hetta, tí tað er léttari at samanbera frá einum ári til annað, tá broytingarnar eru gjørdar upp í prosentum. Tað er tó greitt, at broytingar í prosentbýtinum skulu takast við fyrivarni, serliga tá hugt verður eftir einstøku lógarøkjunum, tí talan er um so fá mál, at heilt fáar avgerðir kunnu hava avgerandi ávirkan á tølini.

# Forsorgarmál

| | 2012 | | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 47 | 73% | 21 | 57% | 18 | 64% |
| Broytt | 6 | 9% | 3 | 8% | 2 | 7% |
| Heimvíst | 3 | 5% | 5 | 13,5% | 5 | 18% |
| Burturfallin | 8 | 13% | 8 | 21,5% | 3 | 11% |
| Avvíst | - | | 2 | | 1 | |
| Kærufreist | 2 | | 2 | | 0 | |
| Uppafturtøka | - | | 2 | | 0 | |
| **Í alt** | **66** | | **43** | | **29** | |

Forsorgarlógin fevnir um eitt ógvuliga breitt øki, og hetta vísa avgreiddu málini eisini. Tað er ikki nakað ávíst øki innan forsorgarlógina, har tað eru serliga nógv mál hetta árið, men snúgva málini seg um bæði stuðul til tannviðgerð, avlamisbil, uppihaldshjálp, stakútreiðslur og hjálparráð.

# Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

| | 2013 | 2014 |
|---|---|---|
| Staðfest | | 7 |
| Broytt | 3 | 1 |
| Heimvíst | 1 | 4 |
| Burturfallin | 1 | 0 |
| Kærufreist | 1 | 2 |
| Uppafturtøka | 1 | 0 |
| **Í alt** | **6** | **15** |

## Endurbúgving

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðgjørdi hetta árið nakrar avgerðir hjá Almannaverkinum at nokta stuðul til endurbúgving. Okkurt avslag er grundað á at grundleggjandi treytirnar fyri at játta endurbúgving eru ikki loknar og í øðrum føri er grundarlag fyri at játta stuðul til endurbúgving, men ikki til útbúgvingarleiðina, sum kærarin ynskir. Niðanfyri eru tvey dømi, har Almannaverkið noktaði stuðul til ávísa útbúgving vísandi til, at endurbúgvingarleið skal grundast á stytst møguligu leið at gerast førur fyri at forsyrgja sær og sínum.

## Byggitøkning – ikki byggifrøðing

Kærari hevði søkt um endurbúgving grundað á heilsutrupulleikar. Kærarin hevur eitt styttri bein, ið gevur honum ryggpínu við tyngri og eintáttaðum arbeiði. Kærarin fekk játtað endurbúgving til byggitøkning, men hann ynskti at útbúgva seg víðari til byggifrøðing. Almannaverkið sýtti umsóknini, tí mett varð, at hann kundi finna eitt hóskandi arbeiði við síni útbúgving sum byggiteknikari.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum at sýta kæraranum víðari stuðul til byggifrøðing vísandi til, at talan skal vera um stytst møguligu leiðina hjá tí einstaka at røkka endamálinum at gerast førur fyri at forsyrgja sær og sínari familju.

## Heilsurøktara - ikki HF

Kærari søkti um endurbúgvingarstuðul til HF grundað á sosialar trupulleikar. Frammanundan hesari umsókn hevði hann fingið játtað arbeiðsbúgving til heilsuhjálpara. Almannaverkið noktaði stuðul til HF, men játtaði honum endurbúgvingarstuðul til at taka heilsurøktaraútbúgving, grundað á stytst møguligu leiðina hjá tí einstaka at røkka endamálinum um at gerast førur fyri at forsyrgja sær og sínum. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina.

# Fyritíðar- og fólkapensjón (ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.)

| | 2012 | | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 24 | 86,0% | 14 | 64% | 19 | 83% |
| Broytt | 1 | 3,5% | 6 | 27% | 1 | 4% |
| Heimvíst | 2 | 7,0% | - | | 2 | 9% |
| Burturfallin | 1 | 3,5% | 2 | 9% | 1 | 4% |
| Kærufreist | - | | 2 | | 3 | |
| Uppafturtøka | - | | - | | 1 | |
| **Í alt** | **28** | | **24** | | **27** | |

## Persónligt ískoyti

Flestu málini í hesum bólki snúðu seg um persónligt ískoyti. Talan kann verða um loypandi ískoyti til pensjónina ella ískoyti til ávísar útreiðslur t.d. til brillur ella tannviðgerð. Í flestu førum vóru hesar avgerðir staðfestar, tí tørvsmetingin, sum Almannaverkið hevði gjørt, vísti avlop. Ásett er í kunngerð, hvussu metingin av, um talan er um serliga trupul kor, skal gerast, herundir hvussu tørvsmetingin skal gerast. So hóast kærarar ikki meta seg hava ráð at rinda fyri ávísu útreiðsluna, so er ofta ikki talan um serliga trupul kor sambært kunngerðini og tí ber ikki til at fáa ískoyti.

## Afturgjaldskrøv

Fleiri afturgjaldskrøv vegna ov nógv útgoldna pensjón eru eisini viðgjørd hetta árið. Í einum føri kravdi Almannaverkið kærara at rinda aftur ov nógv útgoldna pensjón á kr. 18.098 vísandi til, at hann hevði ikki boðað frá, at hann varð giftur og tí hevði fingið pensjón sum stakur í 9 mánaðir.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðmerkti, at giftarmál er ein broyting, sum skal fráboðast, av tí at ein giftur pensjónistur fær eina lægri pensjón enn ein stakur pensjónistur. Kærarin hevur ikki fráboðað Almannaverkinum, at hann var giftur. Tí var tað í hesum føri greitt, at upplýsingarskyldan sambært § 22 ikki var hildin. Men hóast tað er so, at ein pensjónistur ikki hevur hildið sína upplýsingarskyldu, so er tað altavgerandi fyri einum afturgjaldskravi, at tað harafturat kann staðfestast, at pensjónisturin visti ella átti at vita, at hann orsakað av manglandi fráboðan fekk ov nógv útgoldið í pensjón. Almannaverkið hevur próvbyrðuna fyri, at pensjónistur móti betri vitandi og við órøttum hevur móttikið pensjónina.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum at krevja aftur ov nógv útgoldna grundarupphædd á kr. 10.905 og viðbót á kr. 2.249 og grundaði

hesa avgerð við, at vísandi til vegleiðingina um upplýsingarskyldu, sum kærarin fekk frá Almannaverkinum, tá pensjónin varð játtað, átti kærarin at vita, at tað var neyðugt at boða Almannaverkinum frá giftarmálinum.

Spurningurin um afturgjald av brennistuðuli varð vístur til nýggja viðgerð hjá Almannaverkinum, tí hesin parturin av málinum var ikki liðugt viðgjørdur.

# Fyritíðarpensjón (tillutan, hækkan v.m.)

| | 2012 | | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 16 | 64% | 16 | 67,0% | 17 | 63% |
| Broytt | 1 | 4% | 1 | 4,0% | 4 | 15% |
| Heimvíst | 3 | 12% | 3 | 12,5% | 5 | 18% |
| Burturfallin | 5 | 20% | 4 | 16,5% | 1 | 4% |
| Kærufreist | 3 | | 1 | | 3 | |
| Uppafturtøka | - | | 1 | | 0 | |
| **Í alt** | **28** | | **26** | | **30** | |

## Hægsta fyritíðarpensjón tillutað, men ikki afturvirkandi

Kærarin flutti til Føroya í 2009 og fekk eftir umsókn tillutað miðal fyritíðarpensjón. Í januar 2014 søkti hann um hækkan av fyritíðarpensjónini, men dagfesti umsóknina 1. oktober 2009, tí hann metti seg hava rætt til hægstu fyritíðarpensjón frá tí degi, hann flutti til Føroya. Hann metti, at tað var manglandi kunning, sum gjørdi at hann ikki beinanvegin fekk hægstu fyritíðarpensjón. Almannaverkið tók tann 26. juni 2014 avgerð um at játta hægstu fyritíðarpensjón frá 1. juli 2014.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum at játta hægstu fyritíðarpensjón frá 1. juli 2014.

Kærunevndin viðmerkti, at tað er ítøkuliga heilsustøðan hjá umsøkjaranum, sum avger, hvat stig viðkomandi fær í pensjón. Tað ber ikki til at søkja um eitt ávíst stig í pensjónini. Almannaverkið metti í 2010, at kærarin hevði rætt til miðal fyritíðarpensjón. Røtt kæruvegleiðing varð givin, men avgerðin varð ikki kærd. Kærunevndin hevur ikki heimild til at fara inn og meta um avgerðina frá juli 2010 og meta um, hvørt kærarin longu tá leyk treytirnar fyri at fáa hægstu fyritíðarpensjón, ella um avgerðin um tillutan av miðal fyritíðarpensjón var í lagi, tí freistin fyri at kæra ta avgerðina er farin fyri meira enn 4 árum síðani.

## Lægsta fyritíðarpensjón varð játtað, men kærarin hevði ikki rætt til fulla upphædd vegna sína bútíð í Føroyum

Kærarin var útlendskur ríkisborgari og hevði búð í Føroyum í góð 11 ár, tá hann fekk játta fyritíðarpensjón. Hann kærdi, at Almannaverkið bert játtaði honum 17/40 av lægstu fyritíðarpensjón.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum, tí mett var, at arbeiðsførið ikki er minkað við í minsta lagi 2/3, sum er treytin fyri at fáa tillutað miðal fyritíðarpensjón.

Viðvíkjandi brotpensjón viðmerkti Kærunevndin í almanna- og heilsumálum, at bútíðin í Føroyum frá tí kærarin flutti higar og til dagfestingina fyri játtan av pensjón er 11 ár, 4 mánaðir og 18 dagar. Bútíðin skal roknast í mun til bútíðina frá fylta 15. árinum til játtanardagin, og hevur kærarin tí rætt til 17/40 partar av lægstu fyritíðarpensjón.

Rætturin til fulla fyritíðarpensión er treytaður av, at bústaðartíðin í danska ríkinum er í minsta lagi 4/5 av árunum frá tí fylta 15. árinum til dagfestingina fyri játtan av pensión. Er treytin fyri tillutan av fullari pensión ikki lokin, verður pensiónin ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 4/5 av tíðini frá tí fylta 15. árinum til dagfestingina fyri tillutan av pensión.

# Dagpeningur

| | 2012 | | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 9 | 64% | 5 | 71% | **8** | **73%** |
| Broytt | - | | 2 | 29% | **1** | **9%** |
| Heimvíst | 1 | 7% | - | | **1** | **9%** |
| Burturfallin | 4 | 29% | - | | **1** | **9%** |
| Kærufreist | 1 | | - | | **1** | |
| **Í alt** | **15** | | **7** | | **12** | |

## Dagpeningur vegna sjúkan hjúnafelaga noktaður

Meginreglan eftir dagpeningalógini er, at dagpeningur einans kann veitast í sambandi við egna sjúku. Dagpeningalógin § 3, stk. 3 víðkar um henda persónsskara soleiðis, at persónar, sum eru burtur frá arbeiði, tí lækni metir, tað vera alneyðugt, at viðkomandi er um álvarsliga sjúkan hjúnafelaga, eisini hevur rætt til dagpening eftir vanligu reglunum. Sum álvarslig sjúka eftir dagpeningalógini er at meta sjúka, har álvarsligur vandi er fyri lívinum ella heilsustøðuni hjá persóninum.

Almannaverkið noktaði kærara dagpening í sambandi við at hesin var við hjúnafelaga sínum í Danmark, tí hann skuldi fáa gjørt beinprotesur umframt til endurvenjing. Hjúnafelagin hevði nakað frammanundan fingið amputera bæði bein um leggirnar og fleiri at ytstu kongunum á 8 fingrum.

Almannaverkið vísti á, at sambært læknaváttan varð ikki mett, at talan er um lívsvanda ella álvarsligan heilsu-vanda.

Kærarin viðmerkti, at tað var ikki møguligt hjá hjúnafelaganum at vera einsamallur í Danmark – tað var neyðugt, at hann var um hjúnafelagan alla tíðina, tí hjúnafelagin kláraði ikki nakað sjálvur.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum metti uttan mun til, at lækni váttar, at tað var alneyðugt, at kærarin var um sín hjúnafelaga, var talan ikki um tílíkan bráðfeingis álvarsligan heilsuvanda, at tað var alneyðugt, at kærarin var um hjúnafelagan. Kærunevndin staðfesti tí avgerðina hjá Almannaverkinum, tí mett var, at talan ikki var um álvarsligan vanda fyri heilsustøðuni hjá hjúnafelaganum og tí vóru treytirnar fyri dagpeningi ikki loknar.

# Barnagjaldslógin

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 2 | 1 | 4 |
| Broytt | - | - | 0 |
| Burturfallin | - | 1 | 2 |
| Uppafturtøka | - | 1 | 0 |
| **Í alt** | **2** | **3** | **6** |

Málini snúðu seg um serligt barnaískoyti og forskotsvísa rindan av barnapeningi.

## Mamman búði í Føroyum við børnunum og pápin las uttanlands. Ikki rætt til serligt barnaískoyti.

Mamma søkti um serligt barnaískoyti, tí pápin at børnunum var farin uttanlands at lesa víðari lestur, og hon var eftir í Føroyum við børnunum.

Kærunevndin í almanna og heilsumálum viðmerkti, at støðan má metast at vera tann, at talan er um eitt vanligt parlag við børnum. Partarnir búgva hvør sær, men tey hava ivaleyst ein fíggjarligan felagsskap. Tað, at fíggjarstøðan er so ring, at tey hava torført við at fíggja tað dupulta húsarhaldið, sum tey hava í løtuni, er ein onnur søk. Maðurin hevði fíggjað hennara og øvugt, um inntøkan var til hetta.

Grundað á hetta kann kærarin ikki metast at vera einsamallur uppihaldari, hóast støðan helst er tann, at hon í veruleikanum noyðist at uppihalda sær og børnunum sjálv, tí maðurin í løtuni ikki hevur møguleika at veita sín part til hetta.

Kærunevndin staðfesti avgerðina hjá Almannaverkinum um at sýta at veita serligt barnaískoyti, tí kærarin kann ikki metast at vera einsamallur uppihaldari.

# Stuðul til uppihaldspening

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 3 | 2 | 0 |
| Burturfallin | - | - | 0 |
| Heimvíst | - | - | 0 |
| Kærufreist | 1 | - | 0 |
| **Í alt** | **4** | 2 | 0 |

Á hesum øki eru bert fáar kærur árliga. Hetta árið var ongin kæra

# Innlit

Ein kæra var um avgerð hjá Almannaverkinum at nokta innlit. Henda kæra fall burtur, tí Almannaverkið avgjørdi at taka málið upp til nýggja viðgerð eftir at kært var til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.

# Kommunurnar

Partar av avgerðunum, sum kommunurnar taka eftir dagstovnalógini, barnaverndarlógini og lóg um barna- og ungdómstanntøkt kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Hesar kærur eru ikki nógvar í tali og í 2014 var tilsamans talan um 5 kærur.

## Dagstovnalógin

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 2 | 2 | 0 |
| Broytt | - | - | 0 |
| Heimvíst | - | - | 1 |
| Burturfallin | - | - | 0 |
| Avvíst | - | - | 0 |
| Kærufreist | 1 | - | 0 |
| **Í alt** | **3** | **2** | **1** |

Ein kæra var á hesum øki í 2014 og snúði hon seg um ásetan av inntøkugrundarlagið í sambandi við umsókn um frípláss á dagstovni. Kærunevndin vísti málinum til nýggja viðgerð hjá kommununi.

# Barnaverndarlógin

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 2 | 2 | 2 |
| Broytt | - | 1 | 0 |
| Heimvíst | - | 1 | 1 |
| Burturfallin | - | 2 | 0 |
| Avvíst | - | 3 | 0 |
| Uppafturtøka | - | 1 | 0 |
| Steðgandi virknaður | - | 1 | 0 |
| **Í alt** | **2** | 11 | 3 |

Nevndin viðgjørdi m.a. kæru um rættin hjá foreldri, ið ikki hevði foreldramyndugleikan, at fáa kunning frá barnaverndartænastu um barnið.

# Lóg um barna- og ungdómstanntøkt

| | 2014 |
|---|---|
| Avvíst | 1 |

Kært var um tannlæknaliga viðgerð og ynski var eisini sett fram um endurgjald fyri skeiva viðgerð. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum vísti málinum frá sær, tí kærur um tannlæknaliga viðgerð og spurningar um endurgjald er ikki fevnd av heimildini hjá Kærunevndini.

# Sjúkrahúsverkið

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 4 | 7 | 9 |
| Broytt | 2 | 1 | 0 |
| Heimvíst | - | 1 | 1 |
| Burturfallin | 3 | 4 | 3 |
| Kærufreist | - | 1 | 0 |
| Uppafturtøka | - | - | 1 |
| **Í alt** | **9** | **14** | **14** |

Flestu kærurnar á hesum øki snúgva seg um fylgjarar, men nakrar eru eisini um endurgjald fyri kostnað fyri viðgerð uttanlands.

## Fylgjari sýttur

Kært er um, at Landssjúkrahúsið hevur sýtt at ávísa fylgjara til skurðviðgerð fyri Barrets Oesophagus. Skurðviðgerðin er planløgd, og er ein vanlig ókompliserað viðgerð, har sjúklingurin væntandi verður útskrivaður aftur sama dag. Talan er sostatt av hesi orsøk ikki um heilt serlig viðurskifti, sum kunnu grunda, at fylgjari verður ávístur.

Tann støða, at kærarin hevur tørv á hjálp at bera viðføri í sambandi við ferðina o.s.fr. gevur heldur ikki grundarlag fyri at ávísa fylgjara, tí tað ber til at stíla fyri praktiskari hjálp til tílíkt. Viðvíkjandi tí støðu, at kærarin ikki skal vera einsamallur aftaná skurðviðgerðina, tekur sjúkrahúsið støðu til hetta, og eigur hann at verða útskrivaður til sjúklingahotellið, um hann hevur tørv á hjáveru. Hetta gevur tí heldur ikki grundarlag fyri at ávísa fylgjara.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá Landssjúkrahúsinum at sýta at ávísa fylgjara, tí kærarin ikki er ófullførur at ferðast ella uppihalda sær einsamallur uttanlands.

## Endurgjald fyri viðgerð í Týsklandi

Kært er um, at Landssjúkrahúsið sýtir endurrindan fyri útreiðslur í samband við krabbameinsviðgerð á sjúkrahúsi í Týsklandi. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá Visitatiónsnevndini at sýta endurgjald fyri útreiðslur í samband við viðgerð vísandi til, at Visitatiónsnevndin ikki hevur ávíst kæraran, áðrenn hann fór til viðgerð á sjúkrahúsi í Týsklandi.

# Heilsutrygd

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | - | 3 | 4 |
| Broytt | - | - | 1 |
| Heimvíst | - | - | 1 |
| Burturfallin | 1 | 1 | 0 |
| Kærufreist | - | 1 | 0 |
| **Í alt** | **1** | **5** | **6** |

## Skráseting í Landsfólkayvirlitinum

Nevndin viðgjørdi eitt mál, har kærari metti seg skula frítakast fyri at rinda til Heilsutrygd, meðan hann í eitt ár var búsitandi uttanlands. Heilsutrygd sýtti fyri at frítaka kæraran fyri heilsutryggjaldi vísandi til, at viðkomandi var skrásettur í Landsfólkayvirlitinum. Grundgevingin hjá kæraranum fyri at verða verandi skrásettur í Landsfólkayvirlitinum, hetta árið hann var búsitandi uttanlands var, at hann frá Útlendingastovuni hevði fingið upplýst, at hann, sum tá hevði verið í Føroyum í 5½ ár, kundi vera uttanlands í 12 mánaðir út í eitt, uttan at hetta hevði avleiðingar fyri hansara uppihaldsloyvi, men at hann ikki mátti melda flyting í Landsfólkayvirlitinum, tí so fall uppihaldsloyvið straks burtur. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum staðfesti avgerðina hjá Heilsutrygd.

## Skal rindast til Folketrygd og Heilsutrygd

Kærari var búsitandi í Føroyum og sigldi við norskum skipi. Hann hevði goldið til norsku skipanina Folketrygd og metti seg ikki eisini skula rinda heilsutrygdargjald í Føroyum vísandi til sáttmálan um sosiala trygging. Heilsutrygd helt fast við, at kærarin skuldi rinda heilsutrygdargjald og vísti á, at Nordisk Konvention om Social Sikring regulerar ikki innlendis viðurskifti í Føroyum fyri føroyingar búsitandi í Føroyum.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðmerkti, at við tað at talan er um føroying búsitandi í Føroyum, sum arbeiðir í einum limalandi (Noregi), metir Kærunevndin í almanna- og heilsumálum, at konventiónin samskipar viðkomandi millumlanda viðurskifti í tann mun, tað er ásett í konventiónini, og tí kann í øðrum lagi eisini sigast, at konventiónin "óbeinleiðis" skipar innlendis viðurskifti.

Kærunevndin tók ikki støðu til, um kærarin skuldi rinda heilsutrygdargjald, men heimvísti málið til Heilsutrygd til støðutakan.

## Viðgerðartíðin

Í 2014 var miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum 4½ mánaðir. Hetta er ½ mánað longri enn miðal viðgerðartíðin í 2013 og 2012.

Kærustovnurin arbeiðir altíð við at hava so stutta viðgerðartíð sum gjørligt, men roknast kann ikki við, at tað ber til at stytta miðal viðgerðartíðina niður um 4 mánaðir fyri hetta slag av málum, tí atlit skal takast til ummæli og hoyring.

# 5. Skatta- og avgjaldskærunevndin

## Nevndin

Í Skatta- og avgjaldskærunevndini sita:

- Turið D. Hentze - advokatur og forkvinna
- Rannvá Sólheim - løgfrøðingur
- Albert Ari Thomassen, roknskaparkønur
- Pauli Klakkstein - maskinmeistari
- Niclas Joensen - civiløkonomur HD

## Viðgerðarøkið

Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, toll og meirvirðisgjald
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjald við skrásetingargjald á motorakførum

## Móttikin mál

Í 2014 eru 30 kærur latnar Skatta- og avgjaldskærunevndini. Av hesum eru 22 kærur innan skattaøkið, 6 kærur eru innan mvg-økið og 2 kærur viðvíkja øðrum økjum, ávikavist frávik frá kærufreist og áleggjan av morarentu.

**30**

**Nýggj mál**




Eitt sindur færri kærur eru innkomnar í 2014 enn í 2013, og býtið er eisini øðrvísi. Fleiri kærur eru innan skattaøkið í mun til onnur økir, og her er tað serliga kærur um rentustuðul og toll- og skattafyrisiting, sum eru minkaðar.

## Avgreidd mál

**36**

**Avgreidd mál**

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði 8 vanligar fundir í 2014. Tilsamans vóru 36 mál avgreidd í 2014, meðan talið av avgreiddum málum í 2013 og 2012 var ávikavist 31 og 72.

Talið av avgreiddum málum í 2014 er sostatt á støði við 2013, og aftur væl lægri enn undanfarnu ár. Orsøkin til hetta er, at ikki so nógv mál eru innkomin.

## Býtið av avgreiddum málum

Í 2012 vóru skattakærurnar aftur fleiri bæði í tali og lutfalli í mun til árini frammanundan, har mvg-kærurnar vóru flestar. Í 2013 vóru mvg-kærurnar tó aftur flestar. Í 2014 eru aftur flest skattakærur, og hóast talið av mvg-kærum er fallið er tað serliga kærur innan onnur økir, sum eru færri í tali í mun til 2013.

Lutfalsliga nógv mál eru um mótrokning av avlopsskatti í pensjónsskatti. Hesi mál snúgva seg ikki um sjálva mótrokningina, men um grundarlagið fyri mótrokningini. Nógv mál eru grundað á, at skattingin av pensjónum við inngjald er komin, og at TAKS hevur nýtt serligan útrokningarhátt í hesum sambandi.

| | 2012 | 2013 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Skattur | 30 | 4 | 13 |
| Stuðulslógirnar | 18 | 1 | 0 |
| Sekt eftir § 104 í skattalógini | - | - | 1 |
| Meirvirðisgjald | 9 | 9 | 6 |
| Lønhæddaravgjald | - | - | 0 |
| Skrásetingargjald á motorakførum | 1 | 1 | 0 |
| Tollur og onnur avgjøld | - | 4 | 1 |
| Kærufreist | 6 | - | 3 |
| Mótrokning | 2 | 2 | 8 |
| Uppafturtøka | 2 | 7 | 1 |
| Annað | 4 | 3 | 3 |
| **Í alt** | **72** | **31** | **36** |

## Avgreiðslan

Av 36 kærumálum eru 11 kærumál staðfest av nevndini. Flestu kærumál eru sostatt staðfest, og í hesum er eingin broyting í mun til undanfarin ár.

Á støði við undanfarnu ár eru 5 mál heimvíst til nýggja viðgerð, og eins og tað var galdandi fyri 2013 er hetta lutfalsliga nógv mál fyri 2014, tí so fá mál eru viðgjørd í mun til 2012 og árini áðrenn tað.



# Taks

Av teimum 36 kærunum, sum eru avgreiddar í 2014, eru 28 kærur um avgerðir hjá TAKS.

Í 2013 var tað áhugavert at síggja, at onki mál var broytt. Í 2014 eru 3 mál broytt, og er árið í so máta meira vanligt. 2 av teimum 3 málunum snúgva seg um mótrokning av avlopsskatti í pensjónsskatti, sum eru umrødd omanfyri.

Eins og undanfarna ár er parturin av heimvístum málum tó lutfalsliga stórur í 2014. Aftur eru 2 av teimum 5 heimvístu málunum um mótrokning av avlopsskatti í pensjónsskatti.

Hóast eitt ávíst sveiggj er í tølunum frá ár til ár, kann ikki vísast á nakra serliga orsøk til hesi sveiggj. Talan er um eisini lutfalsliga fá mál íalt, og sveiggini tykjast tí størri, enn tey eru í veruleikanum.

## Býtið av avgreiddum málum

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 17 | 8 | **8** |
| Broytt | 6 | 0 | **3** |
| Partvís broytt | 3 | 0 | **1** |
| Heimvíst | 4 | 5 | **5** |
| Burturfallin | 9 | 2 | **4** |
| Avvíst | 9 | 4 | **2** |
| Annulerað | - | - | **-** |
| Kærufreist | 3 | - | **3** |
| Annað | 5 | 6 | **2** |
| **Í alt** | **57** | **25** | **28** |

Viðvíkjandi málum av serliga stórum týdningi kann upplýsast, at málini í 2014 hava verið fjølbroytt, og at har hava ikki verið serliga nógv mál um sama trupulleika.

## E-sigarettir

Í 2013 vóru fleiri kærumál um, at TAKS hevur sýtt fólki at innflyta vesku til E-sigarettir við nikotini í, við tí grundgeving, at talan er um heilivág. Hesi vórðu mestsum øll heimvíst, tí grundgevingin hjá TAKS fyri avgerðini ikki var nøktandi.

Eitt av hesum málum vendi aftur í 2014, og Kærunevndin staðfesti nú avgerðina hjá TAKS.

## Mótrokning og skatting av inngjaldi til pensjón

Fleiri mál hava í 2014 verið um mótrokning av avlopsskatti í skyldugum pensjónsskatti av egininngjaldi til eftirlønarskipan. Trupulleikin í hesum málum hevur sostatt verið tað kravið, sum liggur til grund fyri mótrokningini, og ikki mótrokningin í sær sjálvum.

Trupulleikin í hesum málum er grundaður í , at ongin skipan er, sum tekur skatt av inngjøldum, sum persónar sjálvir gera til eftirlønarskipanir.

Tá skatturin av inngjøldunum seinni skal gerast upp hevur TAKS valt at leggja til grund, at tað sum er inngoldið, er ein upphædd eftir skatt. Tá skatturin er 40 %, verður hendan upphædd hækkað við 40 %. Skatturin á 40 % verður síðani tikin av tí hækkaðu upphæddini, og frádrátturin verður givin fyri hendan skattin.

Úrslitið av hesum er í fyrsta lagi ein skyldugur eftirlønarskattur, og í øðrum lagi ein avlopsskattur vegna tann útroknaða frádráttin. Avlopsskatturin verður síðani mótroknaður í skylduga eftirlønarskattinum.

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið avgerð um, at heimild bert er at skatta tað veruliga inngjaldið. TAKS hevur sostatt ikki heimild at upproknað gjaldi við 40 %, og útrokna skattin grundað á hetta hækkaða grundarlagið.

# Kommunalu Skattakærunevndirnar

Tað vóru 8 kærur um avgerðir hjá Kommunalu Skattakærunevndunum í 2014, og talið av kærum er sostatt eitt sindur hægri enn vanligt.

Eins og í 2013 eru meira enn helvtin av málunum ávikavist broytt, partvís broytt ella heimvíst, og hetta verður mett at vera nógv.

Stýrið hjá TAKS hevur kært 5 av teim 8 kærdu avgerðunum hjá Kommunalu Skattakærunevndunum. Av hesum eru 2 staðfestar, 2 broyttar og 1 partvís broytt.




## Býtið av avgreiddum málum

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 5 | 2 | 3 |
| Broytt | 4 | 1 | 2 |
| Partvís broytt | - | 1 | 2 |
| Heimvíst | 2 | 1 | 0 |
| Burturfallin | 1 | - | 1 |
| Kærufreist | 3 | - | 0 |
| **Í alt** | **15** | **5** | **8** |

## Frádráttur av inngjaldi til Folketrygd í Noregi

Tvey mál um frádrátt fyri inngjald til Folketrygd í Noregi hava verið í 2014, og hava nøkur eisini verið áðrenn, m.a. í 2011. Inngjaldið til Folketrygd er uppá 7,8 %, og er tað partvís til sosialar skipanir. Spurningurin í hesum málum hevur verið, um frádráttur er sambært rentutryggingarlógini fyri tann partin av gjaldinum til Folketrygd, sum viðvíkur ískoytispensjónini vísandi til § 1 E, stk. 2 í rentutryggingarlógini.

Inntil desember fundin hjá nevndini vórðu øll mál heimvíst, tí grundarlag ikki var fyri at taka støðu í málunum.

Sum seinasta málið var upplýst metti nevndin tó, at ískoytispensjónin í Folketrygd er ein trygging, sum er fevnd av § 1 í rentutryggingarlógini, tvs. at frádráttur er fyri inngjøld til hesa skipan eftir § 1 E, stk. 2 í somu lóg.

Tá talan er um eitt samlað gjald til Folketrygd, og tað ikki ber til at skilja út partin til ískoytispensjónina, má frádráttur gevast grundað á eitt met.

Hetta hevur tó bert týdning fyri gjøld til Folketrygd til 1. januar 2012, tá skattalógin § 154 varð broytt soleiðis, at avgjald, sum er goldið til annað land enn Føroyar og sum er fevnt av norðurlendsku konventiónini um sosialu trygd, nú verður talt við sum ein skattur, goldin í Norðurlondum. Hetta hevur við sær, at hædd verður tikin fyri inngjøldum til Folketrygd í sambandi við uppgerð av skattinum til Føroyar.

# Akstovan

Ongin kæra var um avgerðir hjá Akstovuni í 2014.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2014 var gott 6 mánaðir, og er hetta eitt sindur longri enn í 2012 og 2013.

Viðgerðartíðin verður mett at vera á einum nøktandi støði fyri hetta slagið av málum.

Um hugt verður nærri at orsøkini til, at viðgerðartíðin er longd sæst, at talan er um nøkur mál, sum hava tikið ógvuliga langa tíð at enda, og er orsøkin í hesum málum at finna í viðurskiftum borgarans ella hjá TAKS. Um orsøkin er at finna hjá TAKS er talan um óvanlig mál ella viðurskifti annars. Mett verður tí, at viðgerðartíðin er nøktandi, og ongin orsøk er at gera átøk fyri at stytta um hesa.

# 6. Kærunevndin hjá Studna

## Nevndin

Í Kærunevndini hjá Studna sita:

- Anna Borg Dahl - løgfrøðingur og forkvinna
- Heðin D. Poulsen - løgfrøðingur
- Bjørg Róin - lestrarvegleiðari

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin hjá Studna viðger kærur um avgerðir hjá Studna eftir løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul.

### Móttikin mál

Í 2014 komu 9 nýggjar kærur til Kærunevndina hjá Studna. Hetta er sama tal av kærum sum undanfarna ár, men nógv færri enn í 2012, tá 21 kærur vóru móttiknar.




**9**

## Nýggj mál

6 av kærunum vóru um ferðastuðul til lesandi uttanlands og 3 um lestrarstuðul í Føroyum.

## Avgreidd mál

Kærunevndin hevði 4 fundir í 2014 og avgreiddi 9 mál.

Avgreidda tali er nærum tað sama sum undanfarna ár.

**9**

**Avgreidd mál**

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Ferðastuðul til lesandi uttanlands | 5 | 2 | 5 |
| Lestrarstuðul í Føroyum | 20 | 2 | 3 |
| Lestrarstuðul uttanfyri Føroyar | - | 4 | 0 |
| Lestrarstuðul uttanfyri Norðurlond | 1 | 0 | 1 |
| **Í alt** | **26** | **8** | **9** |

## Avgreiðslan

Av teimum 9 málunum, sum vóru avgreidd hetta árið, vóru 5 staðfest, 1 varð broytt, 2 fullu burtur og í einum føri varð støða tikin til, um frávik skuldi gerast frá kærufreist.



## Aldurin á barninum undan stuðulsárinum avgerandi fyri studningsupphæddina

Søkt var um ferðastudning fyri stuðulsárið 2013/2014 fyri kærarin og barn hansara, sum fylti 2 ár í august 2013. Studni játtaði kr. 2.400 í ferðastudningi til kæraran og kr. 300 til barnið.

Kærarin varð ónøgdur við henda studning, tí við flogferðaseðlaprísunum hjá børnum, ið eru fylt 2 ár, kann hesin studningur upp á ongan máta gjalda so mikið sum ein hálvan flogferðaseðil hjá barninum. Spurningurin hjá kæraran var fyrst og fremst tann, at hvussu tað ber til, at tað ikki verður roknað út frá aldrinum á barninum, men einum føstum degi, eitt ávíst ár.

Kærunevndin staðfesti avgerðina hjá Studna og grundaði hana við, at tá søkt verður um ferðastudning, er neyvt ásett í § 14 í lóg um lestrarstuðul, at tað er aldurin á barninum innan 31. juli undan stuðulsárinum, sum er avgerandi fyri, hvørja upphædd tann lesandi hevur rætt til í ferðastudningi til barnið, og í hesum føri fyllir barnið 2 ár í august 2013, og tí hevur kærarin bert rætt til kr. 300 í ferðastudningi til barnið.

## Kærarin leyk treytirnar um tilknýti, tí hann hevði fastan bústað saman við familjuni í Føroyum, áðrenn hann fylti 20 ár

Studni noktaði kærara lestrarstuðul vísandi til, at hann hevði útlendskan ríkisborgararætt og hevði ikki havt fastan bústað í Føroyum í minsta lagi tvey samanhangandi ár, áðrenn farið varð undir útbúgvingina.

Støðan var tann, at kærarin var føddur í øðrum norðurlandi, har mamma hansara nam sær útbúgving. Familjan flutti til Føroya, tá kærarin var 12 ára gamal. Seinni, tá foreldrini fóru frá hvør øðrum, flutti kærarin saman við pápa sínum aftur til útlandið. Hetta var í september 2006. Restin av familjuni, yngri systkin og mamman, vórðu verandi eftir í Føroyum. Seinni búði kærarin aftur í Føroyum, men bert eitt stutt tíðarskeið. Hann hevur tó alla tíðina ferðast millum bæði heimini í Føroyum og uttanlands.

Í 2014 fekk hann sær fastan bústað í Føroyum við tí í hyggju at nema sær hægri útbúgving og søkti Studna um lestrarstuðul. Studni noktaði.

Kærunevndin hjá Studna broytti avgerðina hjá Studna vísandi til, at kærarin hevði fastan bústað saman við foreldrunum í Føroyum, áðrenn hann fylti 20 ár, og lýkur hann tí treytirnar fyri at fáa stuðul til lestur í Føroyum.

Tað, at foreldrini blivu skild, og at hann flutti av aftur landinum í september 2006 við pápanum, verður ikki mett at broyta hetta. Lógin setir ikki krøv til, at viðkomandi skal vera búsitandi í Føroyum í ávíst tal av árum ella ikki kann fara av landinum aftur, fyri at fáa stuðul til lestur í Føroyum.

## Viðgerðartíðin

Í 2014 varð miðal viðgerðartíðin fyri Kærunevndina hjá Studna knappar 2 mánaðir. Hetta er góðan ½ mánað styttri enn miðal viðgerðartíðin í 2013, sum var 2½ mánaðir.

Viðgerðartíðin á hesum øki verður mett at vera góð og kann neyvan styttast, tí atlit skal takast til, at ummælistíð og hoyring eisini eru partur av viðgerðartíðini.

# 7. Kærunevndin í lendismálum

## Nevndin

Í Kærunevndini í lendismálum sita:

- Johnhard Klettheyggj - løgfrøðingur og formaður
- Fríður P. Dalsgarð - verkfrøðingur
- Birita Wardum - arkitektur

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin í lendismálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um matrikulering og sundurbýti
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um tinglýsing
- Avgerðir eftir lógini um eigaraíbúðir
- Avgerðir eftir lógini um bygging

## Móttikin mál

Í 2014 komu 17 kærur til Kærunevndina í lendismálum.

Hetta eru nakrar fleiri enn undanfarna ár, tá 13 kærur komu inn, men nógv færri




**17**

**Nýggj mál**

enn árini frammanundan, tá miðaltalið av kærum til Kærunevndina í lendismálum hevur ligið á leið 29 árliga.

Eins og undanfarin ár eru flestu kærurnar hetta árið um bygging. Heili 15 av kærunum vóru um bygging, 1 kæra var um matrikulering og sundurbýti og 1 kæra var um ognartøku.

Ongar kærur vóru um tinglýsing í 2014.

## Avgreidd mál

Kærunevndin í lendismálum hevði hetta árið 7 fundir og avgreiddi 18 mál.

Hetta eru nøkur færri enn bæði undanfarnu árini, tá nevndin avgreiddi ávikavist 21 og 29 mál.

Ein lítil broyting er í býtinum millum tey ymisku evnini við tað, at eingi mál um matrikulering, sundurbýti og tinglýsing vóru hetta árið og bert 1 mál var um ognartøku.

**18**

**Avgreidd mál**

Byggimálini vóru 17 í 2014. Í 2013 og 2012 vóru 15 fyri hvørt árið.

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Byggimál | 15 | 15 | 17 |
| Matrikulering/sundurbýti | 6 | 6 | 0 |
| Tinglýsing | 3 | - | 0 |
| Ognartøka | 5 | - | 1 |
| **Í alt** | **29** | **21** | 18 |

## Avgreiðslan

Um hugt verður eftir øllum avgreiddu málunum, so eru færri staðfestingar í 2014 enn bæði undanfarnu árini.

Parturin av avgerðum, sum eru heimvístar, er nakað tað sama sum hini undanfarnu árini, meðan ein avgerð er broytt í 2014 í mun til 4 árið fyri. Í 2014 fullu 2 kærur burtur, 3 kærur vóru afturkallaðar, og 1 kæra bleiv avvíst.



## Kærur um byggimál – 17 íalt:

Hesi mál fevna um byggimálsviðgerð av ymiskum slagi, og kann talan vera um kærur frá byggiharra, tí hann ikki fær tað byggiloyvið, sum hann metir seg hava rætt til, men eisini um kærur frá granna, sum metir, at bygt er t.d. ov høgt ella ov nær. Tað serliga við hesum øki er, at tað ikki einans eru lógir og kunngerðir, sum nevndin skal fyrihalda seg til, men eisini byggisamtyktir, sum eru ymiskar frá øki til øki.

## Vørn hevði ikki partsstatus

Vørn kærdi um byggi – og nýtsluloyvi hjá P/F Vága Floghavn. Kærunevndin í lendismálum avgjørdi at avvísa hesa kæruna og grundaði hetta við at Vørn/Brunaeftirlitið er ikki at rokna sum partur í hesum byggimálinum og tí ikki hevur rætt at kæra.

Viðmerkt varð, at almennir myndugleikar ella myndugleikapersónar kunnu vanliga ikki verða partar í teimum fyrisitingarligu málum, ið teir sum myndugleiki arbeiða við ella hava eftirlit við.

## Byggiloyvi til fjós

Kærari hevði søkt um byggiloyvi til fjós. Kommunan vísti á, at hon arbeiddi við at endurnýggja byggisamtyktina fyri kommununa, og at umsóknin verður viðgjørd, tá hetta er liðugt.

Kærunevndin í lendismálum vísti málinum til nýggja viðgerð hjá kommununi og grundaði avgerðina við, at kommunan sum meginregla ikki hevur heimild at útseta at taka støðu til umsókn um byggiloyvi til fjós/úthús á einum øki, sum sambært byggisamtyktini liggur í landbúnaðarøki, á hesum grundarlagi. Kommunan hevur tey neyðugu amboðini, ið krevjast til at stýra møguligari framtíðarbygging. Í hesum sambandi verður víst til §§ 8, 9 og 6, stk. 1, í býarskipanarlógini.

## Kæra um ognartøku

Tað var ein kæra um eina møguliga ognartøku frá 1988. Tann kæran bleiv afturkallað.

Miðal viðgerðartíðin í 2014 var 3 mánaðir og 10 dagar. Miðal viðgerðartíðin í 2013 var 7 mánaðir og 5 dagar. Viðgerðartíðin er sostatt stytt við 4 mánaðum í 2014.

Strembað verður altíð eftir at stytta um viðgerðartíðina, og hetta varð rokkið í 2014. Men tó verður viðmerkt, at árið 2014 var serstakt, tí tað vóru ikki so nógvar kærur, og tí vóru ikki so nógv mál avgreidd. Mett verður at hetta hevur havt stóra ávirkan á viðgerðartíðina í

# Viðgerðartíðin

2014. Roknað verður við, at vanliga miðal viðgerðartíðin fyri hesa nevnd kemur at liggja millum 3 til 6 mánaðir. Ein orsøk er, at tað ofta eru fleiri partar í hesum málum, sum allir skulu hava høvi at gera seg kunnugan við innkomnu upplýsingarnar og koma við viðmerkingum. Tí tekur tað ofta langa tíð at fáa hesi mál lýst.

# 8. Vinnukærunevndin

## Nevndin

Vinnukærunevndin verður samansett av trimum ella fimm limum, tá hon skal taka støðu til einstøk kærumál, formanninum ella næstformanninum og tveimum ella fýra limum við serkunnleika á viðkomandi øki.

- Gurið Joensen - løgfrøðingur er formaður
- Eyðbjørn Larsen - løgfrøðingur er næstformaður

## Viðgerðarøkið

Vinnukærunevndin viðger kærur um:

- avgerðir hjá Akstovuni eftir lóg um ferðslu
- avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi
- avgerðir hjá Jarðfeingið eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti
- avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø
- avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping
- avgerðir hjá Landsverk eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál
- avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu og lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
- avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal
- avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi
- Harumframt viðger Vinnukærunevndin kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.

## Móttikin mál

**14**

**Nýggj mál**

Í 2014 eru 14 kærur latnar Vinnukærunevndini. Hetta eru nakrar færri enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 17 og 20 kærur vórðu móttiknar.

Flestu móttiknu kærurnar hetta árið eru um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum eru 8 í tali. Harnæst koma kærur um avgerðir hjá Akstovuni, sum eru 4 í tali. Harafturat kom 1 kæra inn um avgerð hjá Kappingarráðnum og 1 um avgerð hjá Arbeiðseftirlitinum.

## Avgreidd mál

**14**

**Avgreidd mál**

Tiknar vórðu 14 avgerðir í 2014. Hetta eru nógv færri avgerðir enn undanfarin ár og er orsøkin til hetta, at tali av innkomnum kærum er lækkað.

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Skráseting Føroya | - | - | **0** |
| Landsverk | 6 | 6 | **0** |
| Arbeiðseftirlitið | - | - | **1** |
| Akstovan | 6 | 6 | **6** |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 12 | 7 | **5** |
| Posteftirlitið | - | - | **0** |
| Fjarskiftiseftirlitið | 1 | - | **0** |
| Kappingarráðið | - | - | **2** |
| Tryggingareftirlitið | 2 | 1 | **0** |
| Jarðfeingi | 1 | 5 | **0** |
| Setanarprógv | 1 | - | **0** |
| **Í alt** | **29** | **25** | **14** |

# Avgreiðslan

Vinnukærunevndin staðfesti 5 av avgerðunum og heimvísti 4. 1 varð avvíst, 1 fall burtur og 2 vórðu afturkallaðar.

Harumframt tók nevndin í 1 føri støðu til, um avgerð hjá nevndini skuldi takast upp aftur til nýggja viðgerð.



# Akstovan

## Serkøn

- Jón Kragesteen - lærari og serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Gudrun Mortansdóttir Nolsøe - serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Palli Mortensen - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Sølvi Reinert Hansen - serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini

## 6 avgreidd mál




## Krøv til sjón í koyrikortkunngerðini

Kært er um, at Akstovan hevur sýtt kæraranum koyrikort til bólk CE (stórt viðfestisakfar til lastbil), og Akstovan hevur inndrigið koyrirættin til bólkarnar C (lastbil) og D (buss), tí kærarin ikki lýkur krøvini til sjón, sum eru ásett í fylgiskjali 2 til koyrikortkunngerðina. Tað framgongur m.a. av hesum fylgiskjali, at sjónvinkulin skal vera 70 gradir til vinstru og høgru. Sambært kanningini hjá eygnalæknanum er sjónvinkul kærarans til høgru umleið 30 gradir, og lýkur kærarin longu av hesi orsøk ikki krøvini til sjón, sum eru ásett í fylgiskjali 2 til koyrikortskunngerðina. Vinnukærunevndin hevur staðfest avgerðina hjá Akstovuni, tí grundarlag hervið er fyri at sýta honum koyrikort til bólk CE (stórt viðfestisakfar til lastbil) vísandi til § 18, stk. 2, nr. 2 í ferðslulógini og § 18, stk.1 og stk. 2 í koyrikortskunngerðini.

## Endurnýggjan av koyrikorti

Kært varð um, at Akstovan tók avgerð um at endurnýggja koyrikort kærarans fyri eitt styttri gildistíðarskeið á 1 ár vegna tilburðir við svimbul.

Vinnukærunevndin staðfesti avgerðina hjá Akstovuni og grundaði hana við, at grundarlag er fyri at stytta gildistíðarskeiðið fyri koyrikortið, tá ivi er um heilsustøðuna hjá kæraranum. Hetta er grundað í atlitinum til ferðslutrygdina, sum er endamálið við ferðslulógini. Fyri kæraran hevur hetta ikki annan týdning enn, at heilsustøðan í mun til eitt møguligt nýtt koyrikort skal metast aftur um 1 ár ístaðin fyri um 2 ár.

# Heilsufrøðiliga Starvsstovan

## Serkøn

- Bergur Hanusson, djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi djórasjúkulógini, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um hald og innflutning av vandamiklum djórum
- Jústines Olsen, djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi djórasjúkulógini, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um hald og innflutning av vandamiklum djórum
- Jákup Mørkøre, verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini
- Guðrið Andorsdóttir, cand. scient. og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini
- Niels Therkildsen, djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi alilógini, matvørulógini, djórasjúkulógini, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um hald og innflutning av vandamiklum djórum
- Ole Jürgens, djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Ari Johannesen, cand. merc. og serkønur limur viðvíkjandi alilógini
- Ingolf Joensen serkønur limur viðvíkjandi alilógini




## 5 avgreidd mál

## Flyting av livandi seyði millum oyggjarnar

Kært varð um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði tikið aftur loyvi at flyta livandi seyð millum oyggjarnar S og B frá 1. januar 2015.

Vanliga er ikki loyvi at flyta livandi seyð millum oyggjarnar og undantaksloyvi verður bert givið at flyta seyð, sum skal til flettingar ella til einstakar seyðir at seta við – hetta seinasta fyri at sleppa undan innanøring.

Í hesum føri hevði kærari fingið undantaksloyvi, sum mestsum var vorðið til eitt standandi loyvi. Talan hevur verið um ein feil. Tá grundarlag ikki er fyri at veita kæraranum undantaksloyvi, kann loyvi afturkallast við rímiligari freist. Vísandi til hetta hevur Vinnukærunevndin staðfest avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um at taka loyvi hjá kæraranum at flyta livandi seyð aftur.

## Innflutningur av hundum

Vinnukærunevndin tók í tveimum málum avgerð um loyvi til innflutning av hundum. Í øðrum førinum var talan um innflutning av hundahvølpi yngri enn 3 mánaðir og í hinum førinum var talan um innflutning av hundi av slagnum Bullmastiff. Í báðum førum var avgerðin hjá Vinnukærunevndini, at málið skuldi heimvísast. Í tí eina førinum hevði Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki tikið støðu til, um hundahvølpurin kundi koma undir undantaksreglu og í hinum førinum varð niðurstøðan, at talan var ikki um kamphund, men at meting skuldi gerast av, um hald og innflutningur skuldi sýtast grunda á vanda.

## Forboð fyri sølu av fiski til matna

Kært var um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur tikið avgerð um, at fiskur frá A ikki má seljast til matna.

Vinnukærunevndin staðfesti avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um, at fiskur frá A ikki kann seljast til matna, jb. § 4 í matvørulógini. Avgerðin er grundað á umstøðurnar í málinum, m.a. at fiskurin er frystur beinleiðis í goymslulastini, og at ítøkiligar umstøður eru í sambandi við frystingina og landingina av fiskinum, sum hava við sær, at fiskurin kann metast at bera ella kunna vera atvold til sjúku, tí fiskurin kann vera dálkaður.

# Arbeiðseftirlitið

## Serkøn

- Ebba Mortensen - kemiverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsum-hvørvislógini
- John Mikkelsen - maskinmeistari og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsum-hvørvislógini
- Jóngerð Biskupstø - fysioterapeut og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsum-hvørvislógini
- Róðin Mellemgaard - maskinmeistari og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsum-hvørvislógini

1 kæra varð um avgerð hjá Arbeiðseftirlitinum. Hon fall burtur.

# Kappingarráðið

## Serkøn

- Herman Oskarsson - cand. polit. og serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Ingunn Eiriksdóttir - cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Sigurd Poulsen - serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Sigurð Ó. Vang - cand. merc. jur. og serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini

### Almannakunngerðing av upplýsingum – heimildin hjá Kappingarráðnum og ikki hjá Kappingareftirlitinum

Kært er um, at Kappingareftirlitið hevur avgjørt at almannakunngera kanning av, hvussu nógv tað kostar at taka realkreditlán í Føroyum. Í sambandi við kæruna av málinum hevur peningastovnurin sett spurnartekin við, um Kappingareftirlitið hevur málsræði at taka avgerð eftir § 19, stk. 4 í kappingarlógini.

Vinnukærunevndin avgjørdi, at Kappingareftirlitið ikki hevur heimild at taka avgerð eftir § 19, stk. 4 í kappingarlógini, og avgerð teirra frá 16. juni 2014 er sostatt ógildug. Vinnukærunevndin heimvísti málið til Kappingarráðið til støðutakan.

Kappingareftirlitið bað um uppafturtøku av avgerðini at heimvísa málið. Hetta noktaði Vinnukærunevndin og viðmerkti, at Kappingareftirlitið í umbønini um uppafturtøku ikki hevur víst á upplýsingar ella sjónarmið ella annað, sum ikki hava verið partur av viðgerðini hjá nevndini, og sum nevndin ikki hevur tikið støðu til.

Eftirfylgjandi hevur Kappingareftirlitið stevnt Vinnukærunevndina.

## Serligar viðmerkingar

Vísast skal á, at avgreiðslufreistin á 6 vikur hjá Vinnukærunevndini í kappingarlógini er sera stutt, og tað er óheppið, at møguligt ikki er at víkja frá hesi, um umstøðurnar gera tað ómøguligt at halda freistina. Hetta er støðan um kæran kemur inn í feriutíð, og eisini um kærarin ella myndugleikin hevur tørv á longri hoyringsfreistum. Ein freist á 6 vikur er undir øllum umstøðum stutt í kæruhøpi, og lítið skal tí til, áðrenn freistin ikki kann haldast. Gott hevði verið, um freistin var longd, ella áseting var gjørd um, at víkjast kann frá freistini, um umstøðurnar tala fyri tí.

Vísast skal eisini á, at heimildirnar hjá ávikavist Kappingarráðnum og Kappingareftirlitinum í kappingarlógini eru ógreiðar. Hugtøkini Kappingarráðið, Kappingareftirlitið og Kappingarmyndugleikin verða nýtt í lógini, og kann nýtslan av hesum til tíðir tykjast tilvildarlig. Ein áseting er, sum leggur dagligu umsitingina av lógini til Kappingareftirlitið, samstundis sum nógvar serligar ásetingar eru í lógini, sum leggja avgerðarheimildina til antin Ráðið, Eftirlitið ella Kappingarmyndugleikan. Í løtuni er eitt rættarmál um heimildina hjá Eftirlitinum at taka avgerð sambært eini serligari áseting í kappingarlógini, og er orsøkin til hetta rættarmál, at lógin ikki er greið. Hetta er arbeiðskrevjandi og kostnaðarmikið, og ynskiligt hevði verið, at lógin var eftirhugd í mun til hetta.

Vinnukærunevndin fevnir eisini um niðanfyri nevndu øki, men í 2014 hevur nevndin ikki viðgjørt kærur innan hesi øki.

## Fjarskiftiseftirlitið

**Serkøn**

- Knud Erik Skovby - professari og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Rannvá Sólheim - cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Sigurjón Ingvason - cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Una Joensen - cand. oecon. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini

## Jarðfeingi

**Serkøn**

- Bogi Bech Jensen - serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Petur í Króki - sterkstreymsverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Sigurd Lamhauge - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Sigurð í Jákupsstovu - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni

## Landsverk

**Serkøn**

- Boði Haraldson - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Katrin Joensen - tekniskur assistentur og landmátingarteknikari og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Pætur Joensen - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Óli Johansen - landmátingarteknikari og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir

# Posteftirlitið

**Serkøn**

- Hjørdis Gaard - cand. scient. pol. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Marja Lamhauge - framleiðsluverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Sigurjón Ingvason - cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Vivi Egholm - cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi

# Skráseting Føroya

**Serkøn**

- Árni Ellefsen - cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini
- Birita S. Samuelsen - advokatur og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini
- Brynleif Poulsen - cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini
- Vivi Egholm - cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini

# Sjóvinnustýrið

**Serkøn**

- Edvard Bjarnason - serkønur limur viðvíkjandi loðslógini
- Klæmint Østerø - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi loðslógini

# Tryggingareftirlitið

**Serkøn**

- Laila Mortensen - cand. act. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingarvirksemi
- Ole Haugaard Nielsen - aktuar og serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingarvirksemi

# Setanarprógv

## Serkøn

- Anna Borg Dahl - cand. jur. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Alfred Petersen - advokatur og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Andrias Ziska - cand. jur. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Jan Mortensen - MSc. Eng. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Maria á Dul - MAP og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Páll Nielsen - advokatur og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum

# Gjald fyri kærur

Vísandi til § 7 í kunngerð nr. 78 frá 28. august 2008 um vinnukærunevnd er gjald ásett fyri viðgerð av ávísum kærum til Vinnukærunevndina. Kostnaðurin fyri kæruviðgerð er settur til kr. 4.000,00 uttan tá kæran viðvíkur viðurskifti, sum ikki hava samband við tað aktuella ella framtíðar vinnuvirksemið hjá viðkomandi, sum kærir. Í slíkum førum er kostnaðurin kr. 2.000,00.

Í 2014 er gjald á kr. 4.000,00 rindað 1 ferð.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin fyri øll avgreidd mál hjá Vinnukærunevndini í 2014 var knappar 3 mánaðir. Hetta er 1 mánaða styttri enn miðal viðgerðartíðin undanfarna ár. Ein slík viðgerðartíð má metast at vera sera góð fyri hetta slagi av málum og kann neyvan styttast, tá atlit skal takast til ummælis- og hoyrings-freistir.

# 9. Psykiatriska sjúklingakærunevndin

## Nevndin

Limir í Psykiatrisku sjúklingakærunevndini eru

- Nella Festirstein - løgfrøðingur og formaður í nevndini
- Elsubeth M. Fossadal - lækni
- Sámal Lindenskov - sálarsjúkrarøktari

## Viðgerðarøkið

Kærast kann til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina um persónur í sambandi við innlegging á psykiatrisku deild verður útsettur fyri tvingsil.

### Virksemið í 2014

Í 2014 vóru 7 kærur latnar Psykiatrisku Sjúklingakærunevndini. Hetta er fleiri enn í 2013, tá 3 kærur vóru latnar nevndini, men færri enn í 2012, tá 11 kærur komu inn.

Hvør kæra til Psykiatrisku sjúklingakærunevndina inniheldur ofta kærur um fleiri ymisk tvingsilsinntriv og so var eisini hetta árið. Í teimum 7 kærunum varð kært um tilsamans 10 tvingsilsinntriv.

**7**

**Nýggj mál**

## Avgreiðslan

Psykiatriska Sjúklingakærunevndin hevur hildið 8 fundir í 2014. Av teimum 10 tvingsilsinntrivunum, sum kært var um, avgjørdi nevndin at góðkenna 7.

Í einum føri varð kæran afturkallað og nevndin tók tí ikki støðu til hetta tvingsilsinntrivið og í 2 førum avgjørdi nevndin ikki at góðkenna inntrivini. Í tí eina førinum var talan um tvingsilsviðgerð, har nevndin ikki metti at kærarin var so mikið sjúkur at neyðugt var at tvingsilsviðgerða hann. Í hinum førinum var talan um tvingsilsafturhald. Nevndin kom til ta niðurstøðu, at kærarin var dementur og ikki sinnissjúkur, og tí var ikki heimild at afturhalda hann á psykiatrisku deild.

Ein kærari valdi at kæra avgerðina til Føroya Rætt, at Psykiatriska Sjúklingakærunevndin hevði góðkent at hann var tvingsilsinnlagdur. Føroya Rættur staðfesti avgerðina hjá nevndini.

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Tvingsilsinnlegging | 4 | 1 | **3** |
| Tvingsilsfastspenning | 1 | 1 | **2** |
| Tvingsilsafturhald | 2 | 2 | **4** |
| Bráðfeingis sissandi heilivág | 2 | 1 | **0** |
| Fasthaldan | - | 1 | **0** |
| Tvingsilsviðgerð | - | - | **1** |
| **Í alt** | **9** | **6** | **10** |

## Sjúklingaráðgevar

Sjúklingaráðgevar hava verið tilnevndir 46 ferðir í 2014, sum er tað hægsta síðani Psykiatrilógin kom í gildið.

Hetta kemst sjálvandi av, at tá ið tvingsilsfyriskipaninar økjast, so økist eisini tilnevningar av sjúklingaráðgevunum.

Tal av tilnevningum av sjúklingaráðgevum:



## Tvingsilsfyriskipanir á Psykiatriska Deplinum í 2014

Psykiatriski depilin hevur upplýst fyri Føroya Kærustovni, at frá 1. januar til 31. desember 2014 hava 67 tvingsilfyri-skipanir verið tilsamans.

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Tvingsilsinnlegging | 12 | 10 | 13 |
| Tvingsilsfastspenning | 14 | 13 | 21 |
| Tvingsilsafturhald | 12 | 10 | 22 |
| Tvingsilsviðgerð | 13 | 2 | 1 |
| Verjutiltøk | 1 | - | 1 |
| Persónlig vernd | 3 | - | 0 |
| Sissandi heilivágur | - | 17 | 9 |
| Fasthaldan | - | 2 | 0 |
| **Í alt** | **55** | **54** | **67** |

Um samanborið verður við 2013 vísa tølini frá Psykiatriska deplinum, at virksemið er økt frá 54 tvingsilsfyri-skipanum til 67. Sum sæst eru bæði tvingsilsinnleggingarnar, tvingsilsaftur-haldanirnar og tvingsilsfastspenningar hægri enn í 2013, men at sissandi heilivágur er minkaður úr 17 niður í 9.

Psykiatriski depilin vísur á, at býti millum "reyðar" og "gular" innleggingar er helvt um helvt. Áðrenn nýggja psykiatrilógin kom í gildið, var sjáldsamt, at fólk vórðu innløgd uppá gul pappír. Hetta kemst allarhelst av, at kommunulæknarnir brúka henda møguleika, áðrenn vandi er á ferð – ella ikki lata ov langa tíð ganga, til viðgerð verður sett í gongd.

Eisini greiður Psykiatriski depilin frá, viðvíkjandi tvingsilsfastspenningunum, sum eru væl fleiri enn í 2013, at tað vóru 8 persónar, sum er fastspentir eina ferð og 3 persónar, sum eru fastspentir fleiri ferðir, ávikavist 2, 4 og 6 ferðir.

Vart skal gerast við, at í 2013 og 2014 eru tvingsilsfyriskipanirnar settar upp á ein annan hátt enn undanfarnu ár. Árini 2010 til 2012 eru tølini fyri sissandi heilivág, fasthaldan og tvingsilsviðgerð gjørd upp undir einum, sum tvingsils-viðgerð. Nú síggjast tølini fyri hesar tvingsilsfyriskipanir hvør sær.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin fyri kærurnar hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini er umleið 11 dagar í 2014.

# 10. Skuldarumskipanarnevndin

## Nevndin

Í Skuldarumskipanarnevndini sita:

- Jógvan Páll Lassen - lógarkønur og formaður í nevndini
- Jógvan Emil Nielsen - roknskaparkønur
- Nella Festirstein - fyrisitingarkøn

## Viðgerðarøkið

Nevndin viðger umsóknir um umskipan av almennari skuld.

### Móttikin mál

Í 2014 komu 23 umsóknir inn til Skuldarumskipanarnevndina.

**23**

**Nýggj mál**




Hetta er ein lítil lækking í mun til talið av umsóknum tvey tey undanfarnu árini, tá 28 umsóknir komu inn.

Niðanfyri síggjast innkomnu málini uppbýtt eftir skuldarslagi. 9 av umsóknunum vóru um ymiska skuld, 8 um skattaskuld og vóru 3 um mvg. Eitt mál var ein umsókn um at eftirgeva skuld til Heilsutrygd. Tað málið bleiv avvíst, tí Skuldarumskipanarnevndin hevur ikki heimild til at eftirgeva hesa skuldina. Í einum málið, har søkt varð um eftirgeving av ymiskari skuld, var ein partur av umsóknini viðvíkjandi eftirgeving av lestrarláni.

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Ymisk skuld | 8 | 11 | 9 |
| Skattaskuld | 13 | 7 | 8 |
| Mvg | 2 | 3 | 3 |
| Tollur | - | - | 0 |
| Vinnulán og veðhaldslán | - | - | 0 |
| Lestrarlán | 1 | - | 0 |
| Rentur | 4 | 7 | 2 |
| Framleiðslu-, AM- og lønarhæddaravgjald | - | - | 0 |
| Onnur skuld (ongin heimild) | - | - | 1 |
| **Í alt** | **28** | **28** | **23** |

## Avgreidd mál

Skuldarumskipanarnevndin hevði 6 fundir í 2014, og vóru 34 mál avgreidd.

Hetta eru fleiri enn ári frammanundan, tá nevndin avgreiddi 20 mál, men á leið tað sama sum í 2012, tá 35 mál vóru avgreidd.



Niðanfyri síggjast avgreiddu málini uppbýtt eftir skuldarslagi.

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Ymisk skuld | 14 | 6 | 16 |
| Skattaskuld | 8 | 7 | 12 |
| Mvg | 4 | 3 | 2 |
| Tollur | - | - | 0 |
| Vinnulán og veðhaldslán | 2 | - | 0 |
| Lestrarlán | 1 | - | 0 |
| Rentur | 6 | 4 | 3 |
| Framleiðslu-, AM- og lønarhæddaravgjald | - | - | 0 |
| Onnur skuld (ongin heimild) | - | - | 1 |
| **Í alt** | **35** | **20** | **34** |

Málini vórðu avgreidd soleiðis:

| | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|
| Full ella lutvís eftirgeving | 10 | 8 | 11 |
| Veita gjaldsskáa | 7 | 2 | 0 |
| Steðga rentutilskriving | 2 | - | 7 |
| Víst til Skiftirættin, ella privata loysn | 1 | 1 | 4 |
| Umsókn ikki gingin á møti | 8 | 3 | 5 |
| Burturfallin mál | 7 | 6 | 7 |
| **Í alt** | **35** | **20** | **34** |

## Eftirgivin skuld

Skuldarumskipanarnevndin eftirgav í alt umleið kr. 5.054.517 í 2014.

Skuldin er uppbýtt soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| • Rentuskuld | uml. kr. | 2.598.836 |
| • Vinnu- og veðhaldslán | uml. kr. | 0 |
| • Lestrarlán | uml. kr. | 68.895 |
| • Mvg-skuld | uml. kr. | 1.200.169 |
| • Landsskattur | uml. kr. | 1.186.617 |

Tað er torført at seta upp nágreinilig tøl um eftirgevingar, tí ymiskar umstøður gera, at tølini ofta broytast eitt sindur. Rentuskuldin broytist t.d. alla tíðina. Hini tølini kunnu vera broytt eitt sindur, frá tí umsóknin kom inn, til avgerðin varð tikin av nevndini.

Í málunum, har nevndin hevur samtykt ikki at ganga umsóknini á møti, hevur talan í nógvum føri verið um mál, har skuldin er lítil sæð í mun til ogn og inntøku hjá persóninum, ella at umsøkjarin hevur havt frívirði í fastari ogn. Taks hevur eisini í nøkrum førum veð fyri skuldini.

Í 2014 vóru ongar avgerðir tiknar í bólkinum framleiðslugjald, tollur og lønarhæddaravgjald, vinnu- og veðhaldslán.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2014 var góðar 8½ mánaðir og er sostatt longd við nærum 1 mánaða í mun til 2013, men er á sama støði sum í 2012.

Viðgerðartíðin á hesum øki er enn nakað long, og strembað verður altíð eftir at stytta um hana. Men spurningurin er tó, hvussu nógv tað ber til at stytta um hana, tí orsøkin til viðgerðartíðina er ikki so einføld, men ein samanseting av fleiri ymiskum orsøkum.

Mannagongdin í hesum málum er tann, at umsóknarblað um eftirgeving verður sent Kærustovninum, og innheintar stovnurin upplýsingar um skuldina frá TAKS ella Studna alt eftir, um talan er um lestrarskuld ella aðra skuld. Er kommunuskattur partur av skuldini, sum søkt verður um eftirgeving fyri, hevur Skuldarumskipanarnevndin ikki heimild at taka støðu til hendan partin av skuldini. Heimildin at eftirgeva

kommunuskatt liggur hjá kommununum, og áðrenn Skuldarumskipanarnevndin tekur støðu, verður umsóknin send til avvarðandi kommunu til støðutakan av hesum partinum.

Av teimum 34 viðgjørdu málunum í 2014 skuldu kommunur taka støðu til kommunuskattaskuld í 20 málum, og var viðgerðartíðin hjá kommununum í 2014 í miðal 3½ mánaðir. Hetta er longri enn í 2013, tá viðgerðartíðin hjá kommununum í miðal var 2½ mánaðir.

Ummælistíðin hjá Taks var í miðal 1½ mánaða og er hetta tað sama sum í 2013.

Ein onnur orsøk til longu viðgerðartíðina á hesum økinum er, at tað kann taka drúgva tíð at fáa upplýsingarnar frá umsøkjarunum. Í summum førum enda mál, tí umsøkjarin ongantíð kemur við neyðugu upplýsingunum. Hetta kann tó ikki gerast, fyrr enn hálvt ár er runnið, og umsøkjarin fleiri ferðir er mintur á at koma við hesum upplýsingum.

## Viðmerkingar:

Kærustovnurin fer enn einaferð at vísa á, at viðgerðarmannagongdin, sum er neyðug fyri at fylgja ásettu lógarkrøvunum fyri skuldarumskipan, er tung og virkar nakað stirvin, tá talan er um minni skuld.

Mett verður, at skipanin hevði verið meira smidlig og lættari at umsitið, um t.d. Taks hevði havt heimild at eftirgivið minni upphæddir, og at gjørt rentufríar gjaldsavtalur av skuld upp til umleið kr. 50.000,00.

# 11. Fjølmiðlanevndin

## Nevndin

Í Fjølmiðlanevndini sita:

- Anna Katrin Matras - samskiftis- og kunningarfólk, og forkvinna
- Jan Sjóstein - løgfrøðingur
- Ingolf S. Olsen - tíðindafólk
- Liljan Weihe - tíðindaleiðari

Inntil 1. oktober 2014 var nevndin mannað við Súsannu Nordendal, løgfrøðingi og forkvinnu, Halgir Winther Poulsen, advokati, Ingolf S. Olsen, tíðindafólki og Eiriki Lindenskov, blaðstjóra.

## Viðgerðarøkið

Fjølmiðlanevndin viðger kærur um:

- Brot á góðan fjølmiðlasið sambært teimum leiðreglum, sum nevndin hevur ásett við heimild í lógini um fjølmiðlaábyrgd
- Rættin at svara aftur, undir hesum skylduna til at almannakunngerða eitt aftursvar, og spurninginum um innihald, snið og staðseting

### Móttikin mál

Í 2014 eru 10 mál innkomin til Fjølmiðlanevndina. Av hesum eru 8 kærur um brot á góðan fjølmiðlasið, 1 mál er um ógegni og eitt mál er um innlit.

Talið av innkomnum málum er á støði við 2013, har eisini 10 mál vóru móttikin. Í 2012 var talið eitt sindur hægri við 15 innkomnum málum. Tað sæst tó, at talið av kærum um brot á góðan fjølmiðlasið er tað sama, og talið av málum um onnur evni er ymiskt frá ári til ár.

**10**

**Nýggj mál**

## Móttikin mál




## Avgreidd mál

Fjølmiðlanevndin hevði 5 vanligar fundir í 2014 og avgreiddi tilsamans 10 mál. Í 2013 vóru 9 kærumál avgreidd.

Hetta liggur á tí væntaða støði. Talið av kærum um brot á góðan fjølmiðlasið var hægri í 2014 enn í 2013. Ongin umbøn var til nevndina um at taka mál upp av sínum eintingum í 2014. Ein umbøn var um uppafturtøku av eini avgerð hjá nevndini.




## Avgreiðslan

Í 2014 eru 10 mál avgreidd av nevndini, og eru fleiri avvíst í mun til 2013. Harvið eru eisini færri mál viðgjørd í mun til, um leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið eru hildnar.

Av 10 avgreiddum er í tveimum málum viðgjørt, um góður fjølmiðlasiður er hildin, og hevur nevndin í báðum hesum málum givið viðhald í, at góður fjølmiðlasiður ikki er hildin.

Tað eina málið snúði seg um ein miðil, sum ákærdi ein annan miðil at siga ósatt um viðurskifti, ið kundu dokumenterast at vera røtt. Hitt málið var um eina blaðgrein um tvørkynleika, har greinskrivarin var niðrandi í framførslu og orðavali mótvegis persóni, ið hevði traðkað fram í miðlunum um sín tvørkynleika.

7 mál eru avvíst, og 4 av hesum vegna manglandi kærurætt. Viðvíkjandi kærurættinum hevur nevndin tikið støðu til, at kærurættur til Fjølmiðlanevndina er treytaður av, at tað, sum kært er um – sending, grein ella annað – skal í ein ella annan mun handla um kæraran, um hann skal hava rætt at kæra.

2 mál eru send kærda miðlinum til viðgerðar, tí hesin skal viðgera málið áðrenn kært verður til Fjølmiðlanevndina.

1 mál er avvíst, tí nevndin ikki hevði málsræði í mun til kæruna. Kringvarpið var kært fyri, at Røddin varpar og leggur út ónærisligt tilfar í tíðarskeiðum á døgninum, tá børn kunnu lurta og lesa. Hetta sást tó ikki at vera fevnt av nakrari áseting í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið og nevndin hevði tí ikki heimild at viðgera kæruna, sum var avvíst. Løgtingsins Umboðsmaður hevur síðani eisini staðfest, at henda kæran ikki er innan fyri økið hjá Fjølmiðlanevndini.




## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2014 var góðar 4 mánaðir. Viðgerðartíðin er sostatt stytt við einum mánað í mun til 2013.

Viðgerðartíðin er tó enn mett at vera nakað long fyri mál av hesum slag, og arbeitt verður við at stytta um hesa.

# www.kaerustovnur.fo




Á heimasíðuni hjá Føroya Kærustovni finnur tú upplýsingar um virksemið okkara.

Her eru upplýsingar um nevndirnar, nær næsti fundur verður og her ber eisini til at leita í avgerðarsavni eftir avgerðum, sum nevndirnar hava tikið.

www.kaerustovnur.fo

Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur
undir Løgmansskrivstovuni.

Kjarnuuppgávan er at vera skrivstova
hjá kærunevndum, sum viðgera avgerðir
hjá almennum myndugleikum.

Stovnurin fyrireikar mál til 9 nevndir.

Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn

Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo

C4designit.com